TB-NSÍ 4-4 (2-1):

Málveitsla á Sevmýri

Ikki færri enn átta mál vórðu skotin, tá NSÍ vitjaði hjá TB. Men hóast undirhaldsvirðið soleiðis var høgt, so fekk hvørgin parturin nýtt úrslitið til nakað serligt

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað vóru tvey lið, sum bæði fóru eftir sigrinum, tá TB og NSÍ trakaðu inn á Sevmýri sunnudagin. Hjá TB er av álvara farið at sansa at í botnstríðnum, nú KÍ langt um leingi hevur tikið sær um reiggj.

Hjá NSÍ hava seinastu vikurnar havt við sær, at teir av álvara eru um at koma við í oddastríðið, og skuldi fruktirnar av góða arbeiðinum á heimavølli heystast, vóru tey trý stigini eitt krav.

Mált í málum, so er einki at ivast í, at talan var um ein av teimum heilt undirhaldandi dystunum, sum hava verið hetta árið.

NSÍ royndi frá fyrsta bríksli at leggja trýst á tvørámenn. Ivaleyst var sjálvsálitið frá seinastu dystunum, har teir hava syft bæði HB og B36 viðvirkandi til, at roynt varð at koma langt niðan á vøllin, og partvíst gav hetta eisini úrslit í fleiri góðum møguleikum.

Hinvegin, so gav hetta eisini TB góðar fortreytir til sítt kontra-spæl, og tá vertirnir fingu møguleikan, tóku teir í nógvum førum av.

Tað svitast tó ikki, at runavíkingarnir einamest munnu iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at avgera dystin, tá støðan var 4-3. Tvær ferðir høvdu teir opnan møguleika, sum teir tó ikki megnaðu at gera sær dælt av, og í einum trijða føri vóru teir serstakliga ónøgdir við dómarin, sum kolldømdi mál hjá Jónstein Petersen.

Og ístaðin varð tað so TB, sum fekk seinasta orðið, tá Dejan Tomic kundi stúta í kassan, soleiðis at TB fekk eitt stig burturúr.

So er spurningurin, hvørt heimamenninir kunnu vera nøgdir um hetta. Sjálvandi er tað altíð ein góð kensla, tá eitt stig verður tryggjað somikið seint, men fram um nakað, so skal TB nú skjótt til at vinna nakrar dystir. Stigatalvan staðfestir, at tað nú eru fýra stig upp til bjargingina, og avgjørdi lykladysturin í so máta tykist verða, tá TB í næst seinsta umfarinum tekur ímóti VB. Tað líkist í øllum førum eini grannauppgerð, sum er verd at tosa um.

Tað var nógv ferð á, og ikki færri enn átta ferðir kundu áskoðararnir kring Sevmýri fegnast um mál, tá NSÍ vitjaði á Tvøroyri

Mynd: Áki Bertholdsen

FAKTA UM DYSTIN

TB-NSÍ 4-4 (2-1)
0-1: Páll M. Joensen, 26.
1-1: Dan Mortensen, 36.
2-1: Óli Johannesen, 43.
2-2: Jústines R. Hansen, 47.
3-2: Dan Mortensen, 49.
3-3: Christian Høgni Jacobsen, 54.
3-4: Helgi L. Petersen, 77.
4-4: Dejan Tomic, 89.
Dómari: Jens Petur Brattalíð
TB: Predrag Markovic – Jón Tórður Holm, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen – Dan Mortensen (Búi Mortensen, 85.), Aleksandar Jovevic (Allan Smedemark, 70.), Einar Petersen (Birgir Rasmussen, 79.), Allan Poulsen – Dejan Tomic, Hallur Christiansen.
GK: Dan Mortensen
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen (Kári Hansen, 60.), Jónstein Petersen (Einar Hansen, 89.) – Páll Mohr Joensen, Dánjal Hansen, Jústines R. Hansen, Andy Olsen (Sjúrður Jacobsen, 64) – Christian H. Jacobsen, Helgi L. Petersen.
GK: Christian Høgni Jacobsen, Kári Hansen, Jens Martin Knudsen, Sjúrður Jacobsen

Málini

0-1: Páll M. Joensen
NSÍ horna endar hjá Páll M. Joensen, sum smekkar til returin.
1-1: Dan Mortensen
Runavíkingar bakka undan kvika TB-spælaranum, sum dregur inn í brotsteigin, áðrenn hann langar bóltin í kassan.
2-1: Óli Johannesen
Jens Martin Knudsen heilkiksar, tá hann skal boksa burtur, og so kann landsliðsskiparin stúta í tóma málið.
2-2: Jústinus R. Hansen
Christian Høgni og Helgi spæla skjótt niðan eftir, og so gerst Jústinus púrasta leysur.
3-2: Dan Mortensen
Hesa ferð eru tað vertirnir, sum spæla skjótt gjøgnum gestaverjuna, og so gerst Dan leysur á brotsteigarhorninum, haðani hann langar bóltin í málið.
3-3: Christian Høgni Jacobsen
TB-verjan verður fangað fløt, og so sleppur Christian Høgni púrasta leysur móti málinum.
3-4: Helgi L. Petersen
Aftur manglar uppbakningurin í TB-verjuni, og so kann Helgi L. Petersen skjóta TB á sigurskós.
4-4: Dejan Tomic
TB roynir at trýsta seinastu løtuna, og tá bólturin verður sparkaður innfyri, er Dejan hægstur og stútar TB aftur á talvuna.

Danska superligan

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FCK (M)	7	6 - 1 - 0	11	3 8	19	
2 Brøndby (S)	7	5 - 1 - 1	13	7	6	16
3 Viborg	7	4 - 1 - 2	15	9	6	13
4 OB	7	3 - 3 - 1	12	7	5	12
5 FCM	7	3 - 2 - 2	14	14	0	11
6 FC Nordsj.	7	2 - 2 - 3	9	10	-1	8
7 Silkeborg	7	2 - 2 - 3	7	13	-6	8
8 SønderjyskE	7	2 - 1 - 4	11	15	-4	7
9 AaB	7	1 - 3 - 3	6	8	-2	6
10 Esbjerg	7	1 - 2 - 4	9	11	-2	5
11 AGF	7	1 - 2 - 4	11	15	-4	5
12 AC Horsens	7	0 - 4 - 3	1	7	-6	4

Før. leikarar: Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Súni Olsen (Aab)

Danska 1. deild

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Randers FC	5	4 - 0 - 1	12	5	7	12
2 NFA	5	3 - 2 - 0	11	5	6	11
3 Fremad Amager	5	3 - 2 - 0	13	8	5	11
4 Kolding	5	3 - 0 - 2	12	9	3	9
5 Brabrand	5	3 - 0 - 2	5	6	-1	9
6 Vejle	5	2 - 2 - 1	6	5	1	8
7 FC Fredericia	5	2 - 1 - 2	9	8	1	7
8 Lyngby	5	2 - 1 - 2	8	8	0	7
9 Køge	5	2 - 1 - 2	8	8	0	7
10 Herfølge	5	2 - 0 - 3	10	7	3	6
11 HIK	5	1 - 3 - 1	8	7	1	6
12 Frem	5	1 - 3 - 1	8	7	1	6
13 AB	5	1 - 1 - 3	7	10	-3	4
14 Ølstykke	5	1 - 1 - 3	6	10	-4	4
15 Brønshøj	5	1 - 0 - 4	5	17	-12	3
16 Skjold	5	0 - 1 - 4	4	12	-8	1

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, Jónas þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Skjold)

Norska Elituserian

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Start	19	11 - 5 - 3	35	21	14	38
2 Våleranga	18	11 - 4 - 3	31	18	13	37
3 Lyn Oslo	19	9 - 7 - 3	27	16	11	34
4 Viking	19	10 - 4 - 5	29	23	6	34
5 Lillestrøm	19	10 - 3 - 6	30	25	5	33
6 Brann	18	7 - 5 - 6	32	22	10	26
7 Odd Grenland	19	7 - 3 - 9	19	34	-15	24
8 Fredrikstad	18	6 - 5 - 7	27	26	1	23
9 HamarKam	19	6 - 4 - 9	22	27	-5	22
10 Rosenborg	19	6 - 3 - 10	31	33	-2	21
11 Tromsø	19	3 - 9 - 7	20	25	-5	18
12 Molde	18	5 - 3 - 10	23	35	-12	18
13 Bodø/Glimt	19	4 - 4 - 11	22	32	-10	16
14 Aalesund	19	3 - 7 - 9	17	28	-11	16

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (Start)

Norska 1. Deild

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Stabæk	21	14 - 5 - 2	38	15	23	47
2 Sandefjord	21	14 - 4 - 3	41	25	16	46
3 Bryne	21	12 - 5 - 4	46	23	23	41
4 Moss	21	10 - 7 - 4	32	17	15	37
5 Pors Grenland	21	9 - 9 - 3	31	23	8	36
6 Hønefoss BK	21	10 - 5 - 6	33	30	3	35
7 Kongsvinger	21	9 - 3 - 9	32	31	1	30
8 Sogndal	21	7 - 6 - 8	36	41	-5	27
9 Strømsgodset	21	7 - 5 - 9	26	29	-3	26
10 Mandalska.	21	6 - 7 - 8	32	31	1	25
11 Hødd	21	7 - 4 - 10	37	38	-1	25
12 Follo	21	5 - 5 - 11	25	34	-9	20
13 FK Tønsberg	21	6 - 2 - 13	26	38	-12	20
14 Skeid	21	5 - 4 - 12	29	45	-16	19
15 Løv-Ham	21	5 - 3 - 13	18	38	-20	18
16 Alta	21	3 - 4 - 14	20	44	-24	13

Føroyskir leikarar: Atli Danielsen (Sogndal)

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FH	16	15 - 0 - 1	47	8	39	45
2 Valur	15	10 - 1 - 4	27	11	16	31
3 ÍA	16	8 - 2 - 6	20	19	1	26
4 KR	16	7 - 1 - 8	19	22	-3	22
5 Keflavík	15	5 - 6 - 4	24	28	-4	21
6 Fylkir	15	6 - 2 - 7	25	26	-1	20
7 Fram	16	5 - 2 - 9	17	25	-8	17
8 ÍBV	15	5 - 1 - 9	17	26	-9	16
9 Grindavík	16	4 - 3 - 9	19	37	-18	15
10 þróttur	16	2 - 4 - 10	16	26	-10	10

Før. leikarar: Rógvi Jacobsen (KR), Símun Samuelsen (Keflavík)

Enska League Championship

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Sheff Utd.	5	4 - 0 - 1	11	6	5	12
2 Reading	5	3 - 1 - 1	11	2	9	10
3 Luton	5	3 - 1 - 1	8	5	3	10
4 Leeds	5	3 - 1 - 1	6	3	3	10
5 Southampton	5	3 - 1 - 1	6	3	3	10
6 Ipswich	5	3 - 1 - 1	6	4	2	10
7 Derby	5	2 - 3 - 0	8	5	3	9
8 Watford	5	2 - 2 - 1	10	7	3	8
9 Hull	5	2 - 2 - 1	4	2	2	8
10 Wolverh.	5	2 - 2 - 1	5	5	0	8
11 QPR	5	2 - 2 - 1	4	5	-1	8
12 Crystal Pal.	5	2 - 1 - 2	6	5	1	7
13 Stoke	5	2 - 1 - 2	5	7	-2	7
14 Crewe	5	1 - 3 - 1	7	8	-1	6
15 Coventry	5	1 - 2 - 2	5	7	-2	5
16 Leicester	5	1 - 2 - 2	7	10	-3	5
17 Preston	5	1 - 2 - 2	4	7	-3	5
18 Burnley	5	1 - 1 - 3	9	9	0	4
19 Cardiff	5	1 - 1 - 3	6	9	-3	4
20 Plymouth	5	1 - 1 - 3	5	8	-3	4
21 Norwich	5	0 - 3 - 2	3	5	-2	3
22 Sheff Wed	5	0 - 3 - 2	2	4	-2	3
23 Brighton	5	0 - 3 - 2	3	7	-4	3
24 Millwall	5	0 - 1 - 4	2	10	-8	1

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)